# Samkomublaðið fyri jan./febr.

# 2015



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








Vit hava fingið eitt ljós at taka støðu til, og eina ferð fellir dómur yvir tey, sum fara á skeivari síðu av hesum ljósi

**Johannes Martin Olsen**

www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Hvar fer tíðin?

*Sólfríð Heinesen*

Bárður á Lakjuni syngur í einum sangi ”Hvar fer tíðin, hvar fer tíðin, tíðin fer.” Vert er at hugsa um hetta, nú aftur eitt ár at enda er komið.

Fyri meg persónliga gjørdist hetta árið, tá ið okkara yngsta barn gjørdist 18 ár, og hini 6 hava fingið síni egnu heim. Ja, hvar fór tíðin?

Bárður syngur víðari:”Hvat geri eg, hvat fyllir meg á mínum veg?” Tá komi eg at hugsa um tað, sum stendur í Prædikarinum 2,11 ”Men tá ið eg hugdi at øllum verkum mínum, sum hendur mínar høvdu gjørt, og at teirri møði, sum eg hevði havt av at gera tey, tá sá eg, at alt var fáfongd og eftirsókn eftir vindi…” Og tá Jesus sigur við Martu ”Marta, Marta, tú gert tær ónáðir og stríð av mongum; men eitt er neyðugt…”

Hvussu nógva tíð havi eg ikki brúkt til tað, sum er óneyðugt? Vildi ynkst, at mín tráan fyrst var til at søkja Guðs ríki. Og tit, sum enn hava børn….takið til eftirtektar, áðrenn tíðin fer!
Orð. 22,6 ”Lær tú óvitan um vegin, hann skal halda, so man hann enn á gamalsaldri ikki víkja av honum.”

Bárður syngur víðari ”Tað er nú eg skal liva, tað er nú, eg kann elska. Góði Gud meg vísan ger, so tín kærleiki mítt stavnhald er.”

Gott nýggjár!

# Skrá fyri jan./febr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 12. jan. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 13. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 17. jan. | kl. 21.00: | AWAKE við Kristine Jarnskor |
| Sunnudagur | 18. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Maibritt Frederiksberg<br>Døgurði, 50 kr. Tilmelding krevst.<br>Øll eru væl komin<br>Kl. 14.00 er samkomufundur um páska-stevnuna |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 19. jan. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 20. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 24. jan. | kl. 21.00: | AWAKE við Rúna Rasmussen |
| Sunnudagur | 25. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 26. jan. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 27. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 31. jan. | kl. 21.00: | AWAKE við Pola Jacobsen |
| Sunnudagur | 1. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku.<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 2. febr. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 3. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 7. febr. | kl. 20.00: | Møti við ”tí himmalska manninum”<br>(bróðir Yun) (einki AWAKE) |
| Sunnudagur | 8. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Steven Everett |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 9. febr. | kl. 19.30: | Felags bønarmøti í Solo Deo Gloria<br>(fríkirkjunetverkið skipar fyri) |
| Týsdagur | 10. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 14. febr. | kl. 21.00: | AWAKE við Róa Norðoy |
| Sunnudagur | 15. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Sunnivu Poulsen |

# Lýsingar

**Samkomufundur**
Samkomufundur um páskastevnuna verður sunndagin 18. jan. kl. 14.00.
Aftaná møtið henda sunnudagin er møguleiki at keypa døgurða fyri 50 kr.

**Stóra páskastevnan í Kelduni**
Í døgunum 2. – 6. apríl verður stóra páskastevnan hildin í Kelduni.
Hesu ferð eru vit innbjóðarar til páskastevnuna 2015. Latum okkum gera okkum klár til at tæna landi og fólki okkara við hesi stevnu.

**Vitjan av ”tí himmalska manninum” (Bróðir Yun)**
Hetta vikuskiftið kemur bróðir Yun, sum er partur av tí missiónsarbeiði, ið Keldan stuðlar, á ferð í Føroyum. Leygarkvøldið 7. februar kl. 20.00 verður møti í Kelduni við bróður Yun.

**Vitjan úr Turkalandi**
Okkara trúboðarar Steven og Annika, sum arbeiða í Turkalandi, vitja frá 1. februar til 20. apríl.
Tey ynskja at tæna samkomuni, bæði at tosa við fólk, kveikja til missión og at luttaka í øllum tí dagliga arbeiðinum í Kelduni. Um undirtøka verður tí, so vilja tey eisini undirvísa í drama og hvussu man kann kreativt náa út til menniskju við boðskapinum um Jesus.
Í tí sambandi eru øll væl komin at bjóða teimum heim ella at fáa samtalu og forbøn. Leif Høj samskipar, so til ber at siga honum frá.

**English Fellowship**
Leygardagin 21 februar kl. 16.30 verður English Fellowship í kaféteriuni í Kelduni.
Saturday February 21th at 4.30pm is English Fellowship held in the kafé in Keldan.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584